# *Hent at vita í sambandi við andlát*

Landssjúkrahúsið

Við deyða og jarðarferð er nógv hjá teimum avvarðandi at taka støðu til. Hesin faldarin er ætlaður sum hjálp til avvarðandi at gera neyðugu fyrireikingarnar.

Eftir andlátið skulu avvarðandi seta seg í samband við Kapellið á tlf. 304580. Uttanfyri vanliga arbeiðstíð ber til at ringja 304500, lokal nr. 5888.

## Kista og líkklæði

Ynskja avvarðandi at síggja tann deyða, meðan líkið stendur undir børu, er neyðugt at avtala tíð við viðkomandi deild. Tey avvarðandi taka støðu til, um nakar skal síggja tann deyða í kistuni, og nær kistulokið skal leggjast á.
Tey avvarðandi mugu sjálvi bíleggja kistu og líkklæði. Sí yvirlit á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum.

## Bønarhald

Ynskja tit bønarhald á Landssjúkrahúsinum, vendið tykkum til Kapellið. Avvarðandi skulu sjálvi tosa við prest ella prædikufólkið, sum skal hava bønarhaldið.

## Urguspælari

Landssjúkrahúsið útvegar urguspælara, um áhugi er fyri tí.
Í Kapellinum eru Sálmabókin og Songbók Guds Fólks. Eisini er møguligt at hava egið sangblað. Tørvur er vanliga á 6 berarum.

## Lýsing
Kringvarp Føroya hevur tel. 347500 og teldupost andlat@kvf.fo.

## Gravarar
Boða gravaranum í viðkomandi øki frá skjótast til ber.

## Líkbilur
Umráðandi er, at bilurin er klárur, tá bønarhaldið er liðugt.
Avvarðandi avtala flutning við líkvogni við at seta seg í samband við føraran av líkvogninum hjá avvarðandi kommunu.
Flutningur við kommunala líkvogninum er ókeypis.

## Blómuprýði
Um kistan skal prýðast við blómum, kann børuprýði bíleggjast frá einum av blómuhandlunum. Tey syrgja fyri, at blómurnar koma í kapellið.

## Fráboðan
Landssjúkrahúsið boðar myndugleikum og Skiftirættinum frá andlátinum.

## Stuðul
Heilsutrygd veitir stuðul til gravarhjálp smb. umsókn, tó í mesta lagi 5.000 kr.
Sí www.heilsutrygd.fo

*Les meira og sí ofta settar spurningar á heimasíðu okkara www.ls.fo/andlat.*

*Við samkenslu*

Dagført juni2019—Uttanlandstænastan